UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Løgtingið

Tórshavn, tann 14. oktober 2025
J. nr.: 25/26725-2
Viðgjørt: ARØ
Tygara skriv: 52-025/2025

Svar upp á fyrispurning nr. 52-025/2025 eftir § 52a í tingskipanini til Margit Stórá, landsstýriskvinnu, frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um smidligari barsilsskipan

Spurningar:

1. Nær ætlar landsstýriskvinnan at leggja fyri Løgtingið lógaruppskot um eina smidligari barsilsskipan?
2. Kann landsstýriskvinnan greiða frá, hvussu hetta ætlandi skal skipast, og í hvønn mun hetta fer at geva foreldrum frælsi at verða longur heima hjá børnunum?

Svar til spurning 1:
Lógaruppskotið um at gera broytingar í barsilslógini verður væntandi lagt fyri Løgtingið í februar komandi ár.

Svar til spurning 2:
Ætlanin er at finna eina hóskandi loysn til smidligari barsilsskipan saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Enn er avgerð ikki tikin um, júst á hvønn hátt Barsilsskipanin best kann gerast smidligari.

Tær loysnirnar, sum higartil hava verið umrøddar í politisku skipanini, eru m.a.

- at barsilsfarloyvið við útgjaldi kann "toyggjast", soleiðis at barsilsfarloyvið t.d. kann vera 58 vikur við 90 % útgjaldi, ella 65 vikur við 80 % útgjaldi, ella 74 vikur við 70 % útgjaldi.
- at barsilsfarloyvið kann flættast, soleiðis at t.d. 39 vikur eru við 100 % útgjaldi, og 26 vikur eru við 50 % útgjaldi.
- nakrar vikur kunnu goymast í eitt ávíst áramál.
- foreldur kunnu taka allar vikurnar samstundis.
- ongar vikur av barsilsfarloyvinum/ -peninginum eru markaðar til ávíst foreldur.
- "klippikortskipan" til barsilspengar, sum kann nýtast eftir tørvi innan eitt ávíst áramál.

Hetta skal ikki síggjast sum annað enn hugskot, tí at ein loysn má finnast, sum hóskar bæði arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum. Serliga skal havast í huga, at arbeiðsgevararnir skulu hava møguleika at leggja arbeiðið til rættis, hóast rætturin til barsilsfarloyvið verður strektur yvir eitt longri tíðarskeið enn nú. Tí kann tað hugsast, at rætturin til at vera longri í barsilsfarloyvi enn nú, verður treytaður av avtalu millum arbeiðstakaran og arbeiðsgevaran í einstaka førinum.

Alt hetta eru viðurskiftir, sum skulu umrøðast við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, soleiðis at finnast kann fram til eina so haldgóða skipan sum gjørligt til gagns fyri einstøku familjuna.

Margit Stórá
landsstýriskvinna